# Búmerkjakapping

Nú Fuglafjarðar Mentannarhús er um at verða liðugt bygt, og væntandi verður tikið alment í nýtslu fyrst í juni mánaða, er avgjørt at skipa fyri búmerkjakapping.

Fuglafjarðar Mentannarhús hevur til endamáls at verða karmur um øll hugsandi mentannarlig tiltøk t.d. konsertir, framsýningar, stevnur, fundir, veistlir, dans o.a.

Búmerki skal kunna nýtast til alt vanligt virksemi í svart/hvítum prenti, eins væl og í litum.

Navnið Fuglafjarðar Mentannarhús skal kunna setast afturat búmerkinum.- samanseting av búmerki og navni eru tí vælkomin.

Uppskotið til búmerki kann verða í stødd A4 ella A5, men skal bæði kunna minkast og vaksast, so tað er nýtiligt á øllum, frá brævpappíri til plakatir.

Uppskotið skal verða navnaleyst og bera frámerki, sum er 5 tilvildarlig taltekn (siffur). Saman við uppskotinum skal latast inn afturlatin brævbjálvi við sama frámerki uttan, sum uppskotsetarin hevur á uppskoti sínum. Í uppskotinum skal vera navnaseðil á A4-síðu, sum sigur frá navni, bústaði og telefon hjá uppskotsetarnum. Tá ið dømingin er endað, verða allir brævbjálvar latnir upp.

Dómsnevndin, ið tekur støðu til innsendu uppskot, verður henda:

Rúni Abrahamsen, arkitektur AF - Eyðun Hansen, formaður í Sjónleikarafelagnum - Jógvan á Lakjuni, løgtingsmaður.

Til virðislønir eru avsettar 9.000 kr.
Dómsnevndin avgerð, hvussu viðrslønirnar verða býttar. Tó skal 1. virðisløn ikki verða minni enn 5.000 kr.

Dómsnevndin skilar sær rætt til, ikki at nýta innkomin uppskot.

Vinnararnir verða kunngjørdir á hátíðarhaldi, í samband við at Mentunnarhúsið verður tikið alment í nýtslu.

Uppskotini verða at senda til Fuglafjarðar Sjónleikarafelag innan 10. maj 2002.

Takk fyri stuðulin.



Fuglafjarðar Sjónleikarafelag
Postsmoga 14
530 Fuglafjørður

# KT-fólk til netrøkt og ráðgeving

Farodane hevur sum aðalstevnumið at gerast hin sjálvsagdi samstarvsfelagin. Ein fyritreyt at røkka hesum máli er, at vit hava besta fólkið á okkara liði. Á tann hátt einans kunnu vit geva viðskiftafólki okkara ta kvalifiseraðu tænastu, tey krevja. Sært tú hetta sum eina avbjóðing, vilja vit fegin hoyra frá tær.

**Starvið:**
Sum partur av ráðgevingardeild okkara kemur tú at takast við kundarøkt innan netrøkt og ráðgeving. Partar av arbeiðinum er projektorienterað, eitt nú við implementering av størri loysnum. Virkisøkini eru net, ambætarar, trygd, firewalls, antivirus, Windows, ISA Server, MS Exchange, Linux og webhosting.

**Vit vænta, at tú:**
- ert til reiðar at taka ímóti nýggjum avbjóðingum
- hevur viðkomandi royndir innan økið
- hevur viðkomandi útbúgving
- ert álítandi og fyrikomandi

**Vit kunnu bjóða tær:**
- eitt spennandi og avbjóðandi starv
- støðuga útbúgving á økinum
- eitt gott arbeiðsumhvørvi í eini sunnari fyritøku í menning
- 45 góðar arbeiðsfelagar

Lønarviðuskifti verða avtalað í samráð við leiðsluna.

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin 8. apríl 2002. Starvið verður sett skjótast til ber.

farodane 03-02

FARODANE

*Farodane er 51 ára gamalt handils- og tænastuvirkið, sum í dag er ein av fremstu heildarveitarum til skrivstovuna. Virksemið fevnir um sølu og tænastu av framkomnum KT-loysnum, kopi-, fax- og AV-tólum, skrivstovuinnbúgvi og øðrum skrivstovubúnaði, umframt skeiðtænastuna Kvasir.*

Brekkutún 4
Postboks 109
FO-110 Tórshavn
Tlf. 311414
Fax 317534
e-postur:
farodane@farodane.fo
www.farodane.fo

Frá
## Norðoya Javnaðarfelag

Eykauppstillingarfundur til løgtingsvalið verður í Bøgøtu 3 hóskvøldið 4. apríl kl 20.00.

**Nevndin**

## Skrivstovuhøli til leigu

Skrivstovuhøli til leigu, uml. 100 m2 til støddar, í húsinum hjá Føroya Postfelag á Tinghúsvegi 15.

Nærri fæst at vita um hølini á tlf. 317231 ella 217231.

## Frá Hondbóltssambandinum

Aðalfundur verður 4. mai 2002 kl. 9.00 á Hotel Hafnia.

**Hondbóltssamband Føroya**


# AUTO



-Dag & nátt-

-Alt døgnið-

Hýra bil
- ring 311234

BENZIN
DIESEL
KIOSK

AUTO
311234



**REOLIR**
**Hædd 2-3 m**



*Hillar:*
*30 x 90 cm*
*45 x 90 cm*
*60 x 90 cm*
*75 x 90 cm*
*90 x 90 cm*

*Til tey størri goymslurúm bjóða vit stigar og bjálkar til europlattar*

Kaj Andreasen & Co
Heilsøla, smásøla og umboð - Tel. 315600 - Fax 318008




## Náttúru- og umhvørvisvirðisløn Norðurlandaráðsins 2002

Áttanada árið á rað býtur Norðurlandaráðið náttúru- og umhvørvisvirðislønina út. Virðislønin, sum er 350.000 danskar krónur, verður latin privatum ella almennum virki, bólki ella einstaklingi, sum hevur víst serligt virkisfísni innan náttúru- og umhvørvisvernd.

**Evnið í 2002**

*Náttúru- og umhvørvisvirðislønin verður í 2002 latin einstaklingi í einum av norðurlondunum, sum á serligan hátt hevur ment og borið út hugsanir, sum við byrjanini av 21. øld kritiskt viðgera korini hjá nútíðar menniskjanum og samfelagsins viðurskifti við náttúruna.*

Øll kunnu lata inn uppskot um virðislønarvinnara. Uppskotið skal innihalda lýsing av arbeiðinum og upplýsingar um, hvør hevur framt ella fer at fremja hetta verkið. Arbeiðið skal hava fakliga góðsku og týdning í breiðum samanhangi í einum ella fleiri av norðurlondunum. Uppskotið skal orðast á í mesta lagi tveimum A4 síðum.

Virðislønarmóttakarin verður útnevndur av eini dómsnevnd, ið hevur umboð úr Grønlandi, Íslandi, Føroyum, Noregi, Danmark, Álandi, Finnlandi og Svøríki.

Uppskotini, ið skulu skrivast á eitt serligt skjal, skulu vera inni í seinasta lagi **mikudagin hin 29. mai**. Skjalið og grundgevingin fyri evninum í ár fáast á heimasíðu Norðurlandaráðsins www.norden.org ella við at venda sær til skrivstovuna hjá donsku sendinevndini:

**Nordisk Råd**
***Den Danske Delegation***
Christiansborg, 1240 København K
Tlf. (+45) 33 37 59 58, Fax. (+45) 33 37 59 64

Til ber eisini at venda sær til skrivstovuna hjá føroysku sendinevndini, Erling Jallsgøta 6, 100 Tórshavn, tlf. 311000, fax 310686

Starv

# Maskinmeistari

Við hesum verður søkt eftir einum maskinmeistara til Strandfaraskip Landsins, at seta skjótast gjørligt.
Maskinmeistarin skal byrja umborð á M/S "Rituni", men skal til eina og hvørja tíð kunna verða fluttur umborð á øll skip hjá Strandfaraskipum Landsins, sum fyriskipað av leiðsluni.

**Uppgávurnar hjá skipunum**
Høvuðsuppgávurnar hjá skipunum eru at røkja innanoyggja fólka- og farmaflutning eftir fastlagdari ferðaætlan og annars aðrar túrar við ferðafólki runt oyggjarnar.
Umborð á Rituni eru knýttir íalt 4 mans, og 3 mans sigla við hvørja ferð. Arbeiðstíðin er 56 tímar um vikuna og siglt verður í 3 vikur, síðani 1 vika avspáking.
Viðkomandi, ið settur verður, skal sigla 2 vikur sum stýrimaður og 1 viku sum motorpassari.
Dagliga farleiðin er Tórshavn-Nólsoy og ein túr um vikuna til Skúvoyar.
Umstøður eru ikki at búgva umborð.

**Starvið fevnir um**
Maskinmeistarin skal vera við til at tryggja, at maskinaríið er í so góðum standi at øll, bæði manning og ferðafólk, kunnu kenna seg trygg, og annars at veita leiðsluni eina skilagóða rakstrarfyrisiting.
Maskinmeistarin skal eisini verða við til at tryggja, at allar lógir og reglur á økinum verða fylgdar, og at arbeiðsgongdin er í trá við málsetningin hjá fyritøkuni.

Aðrar høvuðsuppgávur hjá motorpassaranum eru at vera við til:
- Seta upp viðlíkahaldsmannagongdir og ætlanir
- Hava eftirlit við maskinarínum
- Tryggja gott samstarv við myndugleikar og aðrar samstarvsfelagar
- Leypandi meta um viðlíkahaldstørvin á maskinarínum

**Førleikakrøv**
- Vinnubræv sum motorpassari ella skipsmaskinistur
- Siglingarbók
- Heilsuprógv, ikki eldri enn 2 ár
- Prógv í nýtslu av bjargingarútgerð
- Roykkavari/sløkkileiðari, ikki eldri enn 5 ár
- Kunnleika til lógarkrøv innanfyri rakstur av ferðamannskipum
- Góð samstarvsevnir og góðan røkjuskap

**Setanartreytir**
Setanartreytir verða sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Maskinmeistarafelagið

**Umsóknir**
Umsóknir við avriti av prógvum og møguligum ummælum skulu sendast til:

***Strandfaraskip Landsins***
***att. Starvsfólkadeildin***
Boks 88
FO-110 Tórshavn

og skulu vera fyritøkuni í hendi í seinasta lagi 15. apríl 2002, kl. 12:00

Um tú ynskir nærri upplýsingar, kanst tú ringja til Páll Heinesen, starvsfólkaleiðara.

Tlf. 343000 ella e-mail: pah@ssl.fo

*Høvuðsuppgávan hjá SL er at lúka landsins tørv á innanlanda fólka- og farmaflutningi, og skal fyritøkan í so stóran mun sum gjørligt rekast á handilsligum støði. Fólka- og farmaflutningurin setir stór krøv um eina góða kundatænastu, herundir trygd, reglusemi og skjótleika.*

*Árliga rakstrarætlanin hjá SL javnvigar við yvir 150 mió. kr. Talið á starvsfólkum svarar til 180 fulltíðarstørv, herav umleið 155 operatørar. Talið á flutningsanleggum er 11 skip, 40 bussar og 15 lastbilar. Flutningsuppgávurnar fevna um alt landið.*

STRANDFARASKIP LANDSINS


HKJ Contractor

**Vit átaka okkum alt innan timburarbeiði.**

**Vit átaka okkum eisini at gera tilboð.**

**Leynar**
tlf. 211774



# DYNAPAC
*-maskinurnar sum halda!*



- Asfaltleggjarir
- Plátuvibratorar til asfalt, grús o.a.
- Breitt úrval av stav- og bjálkavibratorum til betong/stoyping
- Glittemaskinur
- Dykpumpur
- Eykalutir

*Keyp góðsku – keyp Dynapac!*

Sosialurin - 311820

Kaj Andreasen & Co
Heilsøla, smásøla og umboð - Tel. 315600 - Fax 318008


demich

Stiðjagøta 2 – Postboks 378
FO-110 Tórshavn
Tlf.: 311071 – fax: 310460
e-mail: demich@demich.fo

# Lærlingur
**Hevur tú hug at royna teg?**

Vegna økjandi virksemið, søkja vit eftir lærlingi til handil okkara, læran kemur at umfata samskifti við viðskiftafólk, útkoyring og bílegging av vørum o.a.

Væntað verður at tú dugir at arbeiða sjálvstøðugt, er fyrikomandi og hevur hug at veita viðskiftafólki okkara eina góða tænastu.

Fyri at koma í læru, er tað ein treyt, at tú hevur koyrikort og FHS ella HH.

Skrivlig umsókn verður at senda til okkum í seinasta lagi 12. apríl 2002.


www.sosialurin.fo


www.sosialurin.fo